LANDSVERK

Løgmannsskrivstovan

17. mars 2023

Sigurd L. Lamhauge
Journalnr. 23/06988

UMMÆLI AV UPPSKOTI TIL LØGTINGSLÓG UM BROYTING Í LØGTINGSLÓG UM RÆÐI Á MÁLUM OG MÁLSØKJUM (YVIRTØKA AV MÁLSØKJUNUM, SJÓUPPMERKING OG VITAVERK)

Løgmannsskrivstovan hevur sent Landsverki uppskot um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (yvirtøka av málsøkjunum, sjóuppmerking og vitaverk), til ummælis. Landsverk hevur hesar viðmerkingar til uppskotið:

Tørvur er á greiðum fyrisitingarligum karmum ísv. yvirtøkuna
Yvirskipað hevur Landsverk ikki nakra viðmerking til sjálva lógina, men nú sjóuppmerking og vitaverk verða yvirtikin, er neyðugt at umrøða nærri hvussu hesi skulu umsitast, av hvørjum og hvørji markamótini millum ymsu myndugleikarnar og stovnarnar eru ella skulu verða.

Landsverk hevur samstarvað við Søfartsstyrelsen um sjóuppmerking og vitaverk, og nú hetta skal gerast føroyskt málsøki, er høvi at traðka eitt fet aftur, og hyggja nærri eftir hvussu man ynskir at sjóøkið skal umsitast framyvir, og hvønn leiklut ymsu stovnarnir skulu hava í hesum. Í dag er ógreitt, hvussu sjóøkið verður umsitið, og hvør stovnur røkir hvat.

Umrøðast skal um uppgávurnar skulu savnast í eina fyrisiting, sum hevur serkunnleika innan sjóøki, sum so hevur heimild til at geva loyvir og ráðgeva viðvíkjandi sjóuppmerking og vitaverk. Hendan fyrisitingin kann tá eisini umsita fráboðanir, málsviðgera og senda út "efterretninger for søfarende" (EFS), sambært altjóða krøvum (SOLAS).

Tørvur er eisini á at fáa avgreitt onnur viðurskifti knýtt at sjóøkinum. Eitt nú er uppgáva hjá Landsverki at vera hoyringarpartur hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni ísv. málsviðgerð av alilógini – herundir samskifti við Søfartstyrelssen um EFS. Hvussu verður við hesum framyvir?
Eitt annað, sum stendur ógreitt er dálkingarvandar ísv skipsvrak í sjónum. Vit duga ikki at síggja at hesi viðurskifti eru tikin við í metingunum hjá Søfartsstyrelsen (sí fylgiskjøl til LM 114/2018).

LANDSVERK

Fíggjarlig játtan má fylgja við yvirtøkuni
Tað hevur týdning, at avvarðandi stovnur/stovnar, ið fara at umsita økið framyvir, fáa nøktandi játtan til at umsita tað.

Landsverk hevur í dag eftirlit við kommunalum vitum, og vitum sum landið eigur; ialt 61 vitar kring landið. Eftirlitið fevnir um árligt sýn av vitaverkunum v.m.. Í hesum sambandi hevur Landsverk viðmerkingar til kostnaðin í.s.v. rakstur og viðlíkahald av vitaverkum.

Uppskotið frá Løgmannsskrivstovuni nevnir ein kostnað á 5 mió. kr. til yvirtøkuna. Landsverk metir tó ikki, at hetta er ein nøktandi kostnaðarmeting til at reka og umsita økið eftir yvirtøkuna. Metingin tekur útgangsstøði í verandi rakstri av vitunum í Føroyum, men meginparturin av myndugleikauppgávunum hava verið gjørdar í Danmark, og eru tískil ikki við í hesi uppgerð. Millum annað er ætlanin at umsita sjóuppmerking, og hædd er ikki tikin fyri hesum í metingini. Metingin gongur eisini út frá eini árligari rakstrarjáttan, men her má eisini havast í huga at umframt hetta er neyðugt at taka hædd fyri størri umvælingum og dagføringum. Vitar og bygningar standa allir á rættiliga óhøgligum støðum at koma framat, so tískil er neyðugt at leggja upp fyri, at kostnaðurin av at arbeiða á hesum plássum er munandi hægri. Metingin niðanfyri byggir á, at bygningarnir eru ein partur av yvirtøkuni. Um teir ikki eru, er kostnaðurin munandi hægri.

Umsiting				
Vitapassarar	10	stk á	60.000,00 kr.	600.000,00 kr.
Umsitingarlig størv	3	stk á	800.000,00 kr.	2.400.000,00 kr.
Sjóuppmerking (nýtt starv)	1	stk á	800.000,00 kr.	800.000,00 kr.
Rakstur				
Vanligur rakstur av vitum	24	stk á	90.000,00 kr.	2.160.000,00 kr.
Árligar dagføringar (verkætlanir)	1	stk á	500.000,00 kr.	500.000,00 kr.
Bygningar	4	støð	200.000,00 kr.	800.000,00 kr.
DGPS støð	1	stk á	200.000,00 kr.	200.000,00 kr.
Bilar	2	stk á	170.000,00 kr.	340.000,00 kr.
Atkoma - tyrla, bátar v.m.	1	stk á	300.000,00 kr.	300.000,00 kr.
ATV bilar	1	stk á	70.000,00 kr.	70.000,00 kr.
Fyrisitingarligt				
Altjóða samstarv	1	stk á	250.000,00 kr.	250.000,00 kr.
Fráboðanir og nautisk tíðarrit	1	stk á	200.000,00 kr.	200.000,00 kr.
Dagføra sjóuppmerking	1	stk á	200.000,00 kr.	200.000,00 kr.
Árligur rakstur mettur kostnaður				**8.820.000,00 kr.**
Árlig avsetting til dagføringar				**3.000.000,00 kr.**

Landsverk er tilreiðar at luttaka í samstarvinum, um hvussu sjóøkið skal umsitast á føroyskum hondum.

Vinaliga

Sigurd L. Lamhauge
Stjóri